lívdin
- í lívd hins hægsta

Oktober 2007



# Fyrsta málið er rokkið



Skitsa av nýggja bygninginum

Síðani samkoman avgjørdi at arbeiða móti at byggja ein nýggjan bygning, hava vit støðugt sett okkum mál fyri síðani at arbeiða fram móti teimum. Soleiðis hava vit nú eitt stórt og gott grundstykki, sum er planerað og byggibúgvið. Tá árið 2007 byrjaði, settu vit okkum aftur eitt mál, sum var, at vit, áðrenn árið var liðið, skuldu hava 1,5 mió. kr. standandi á bók. Tá hetta mál var rokkið, skuldu vit av álvara fara undir byggingina.

Nú ið fíggjarliga uppgerðin fyri fyrstu sjey mánaðirnar er gjørd, er greitt, at vit longu nú hava rokkið málinum og eru komin upp á 2 mió. kr. orsakað av eini stórfingnari gávu til byggigrunnin uppá 1 mió. kr, sum varð flutt í juli mánaði. Vit frøast um hesa stóru gávu og um, at Harrin signar arbeiðið at útvega samkomuni ein nýggjan bygning.

Eisini kunnu vit gleðast um, at fleiri og fleiri limir í samkomuni hava gjørt fastar peningaligar flytingar til byggigrunnin. Hetta endurspeglar gávumildnið hjá samkomulimum umframt ein kærleika til samkomuna.

Við hesum hava vit rokkið máli okkara væl áðrenn ætlan, og vit kunnu longu nú av álvara fara undir byggingina av nýggja bygninginum við Vegin Langa.

Byggibólkurin arbeiðir í løtuni við myndugleikaprosjektinum, og tað arbeiðið gongur væl.

## Undurfullir sannleikar



*Jógvan Zachariassen*

Vit hava nú brúkt meira enn tvey ár at gjøgnumganga Rómbrævið 1-8. Fyri meg hevur tað verið ein stór signing, tí eg havið fingið eyguni upp av nýggjum fyri, hvussu stór frelsa okkara er. Ja, sanniliga er syndin nógv verri, enn vit halda (kapittul 1-3), og náðin nógv størri, enn vit nakrantíð fara at skilja (kapittul 3-8).

Bøn mín er, at vit øll læra at hugsa um hesar undurfullu sannleikar, vit hava lært, og at vit biðja Harran hjálpa okkum at liva í náðini og kraftini av evangeliinum.

Eg fari nú at taka ein steðg frá Rómbrævinum, inntil eg haldi, at tíðin er komin at byrja aftur frá kapittul 9 og úteftir. Takk fyri bønir og stuðul tykkara gjøgnum kapittul 1-8.

# Vinir í Lívdini

## Hallur av Rana

Hallur av Rana er nýliga komin heim av missiónsmarkini eftir at hava ferðast víða um í Europa við felagsskapinum „Jesus Revolution". Hallur er 22 ára gamal og hevur tvey tey seinastu árini verið í tænastuni í víngarði Harrans. Hetta hava verið hendingarík ár í hansara lívi, har hann hevur givið seg allan í verki Harrans. Áhugavert var at hoyra hann í Lívdini greiða frá hendingum, honum hevði verið fyri.

Gjøgnum toymið, Hallur var við í, vóru nøkur hundrað leidd til Harran runt um í Europa. Fleiri lið ferðast um heimspartin við boðskapinum, og tey eru færri enn tíggju í hvørjum teirra. Tað er gott at síggja ung fólk úr Føroyum gjøgnum „Jesus Revolution" vinna onnur ung í okkara egna heimsparti, ið mangan verður undirmettur, tá tað ræður um at boða evangeliið. Latið okkum biðja fyri Halla, sum hann søkir Harrans leiðslu, at hann skal verða leiddur eftir Guds ráði.



*Hallur av Rana*



*Inga McKendry*

## Inga McKendry í Lívdini

Sunnudagin 2. september høvdu vit í Lívdini vitjan av Ingu McKendry, ið arbeiðir sum umsetari í Meksiko. Inga greiddi henda morgunin eitt sindur frá arbeiði sínum, sum fyrst av øllum er at umseta Bíbliuna til mixtec málið, men hon ger eisini lesitilfar og lærir fólk at lesa.

Inga hevur í løtuni farloyvi og er í ferð við at skriva eina ph.d. ritgerð. Inga er skotsk, men hevur føroyska mammu, sum eisini eitur Inga. Hon æt Inga Sjóstein, áðrenn hon giftist, og er ættað úr Klaksvík.

## Familjan Lützen vitjaði

Á seinasta møtinum í Lívdini áðrenn summarsteðgin vitjaði havnarmaðurin Valdemar Lützen frá Måløv Frikirke saman við familjuni, konuni Ruth og sonunum Anton og Markus. Valdemar takkaði samkomuni fyri førbønir og stuðul. Hann segði m.a.: „Vit heita á tykkum um at biðja fyri teimum nógvu vinapørunum, vit hava, sum enn ikki hava lært Jesus at kenna sum Harra og Frelsara. Biðið, at samtalurnar okkara millum mugu bera ávøkst, at tiltøkini, sum vit hava út frá samkomuni, fara at bera ávøkst, og at uppfylgingararbeiðið eftir GLO summarliðið, sum vitjaði í summar, fer at ganga væl." Ruth er útbúgvin sum pedagogur í summar, og hon fer at virka í samkomuni fulla tíð.



*Ruth og Valdemar saman við synunum Anton og Markus*

## Føroysk verkætlan í India

Sunnudagin 23. september vitjaði Marjun Joensen úr Leirvík í Lívdini, har hon segði frá eini sera áhugaverdari verkætlan í India.



*Marjun Joensen í India*

Við stuðli úr Føroyum hava heimleys børn í India havt høvi at húsast í einum lítlum barnaheimi, sum tveir ungir kristnir brøður reka. Harrin hevur givið teimum eina visión um at fáa eitt barnaheim til 100 heimleys børn upp at standa.

Marjun segði, at tey hava savnað pening inn í Føroyum til verkætlanina, og at tey higartil hava flutt tilsamans 390.000 krónur til India.

Tey, sum vilja stuðla verkætlanini, kunnu flyta pening á konto nr. 9865-103.455.8 í Norðoya Sparikassa. Kontakt: tel. 443259 og 257069. Teldupost: maria_mein@hotmail.com

Meira upplýsingar eru at finna á heimasíðuni: www.123hjemmeside.dk/heimindia

## Sangir og bíbliutímar á fløgu

Heðin Sørensen frá H.S. Studio í Hoyvík hevur tikið upp sjey fløgur við bíbliutímum, sum Zacharias Zachariassen hevur hildið í Filadelfia í Gøtu. Umframt bíbliutímarnar er eisini nógvur sangur á fløgunum, bæði felagssangir, kór o.a.

Evnini á bíbliutímunum eru hesi: „Samkoma Guds og tænasta okkara“ (fløga 1), „Einleiki andans í bandi friðarins“ (fløga 2), „Heilaga Andans dópur og fylling“ (fløga 3), „Ójavnt ok“ (fløga 4), „Dópurin“ (fløga 5), „Tann stilla løtan“ (fløga 6) og „Einglar“ (fløga 7).



*Heðin Sørensen í upptøkurúminum hjá H.S. Studio í Hoyvík*

Tey, sum hava áhugað fyri hesum fløgum, kunnu venda sær til H.S. Studio v/ Heðin S. Sørensen, Maritugøta 48, Hoyvík, tel. 521169

## Tillukku við barninum

2. juli fingu Katrin og Gordon Rajani í Tórshavn ein son, sum eitur Elias. Hann var 52 cm langur og vigaði 3200 gr.

28. august fingu Sirikit og Eiler Jacobsen í Hoyvík ein son, sum eitur Jósef. Hann var 53 cm langur og vigaði 3.950 gr.

31. august fingu Astrid og Ragnar Mouritsen í Sørvági ein son, sum eitur Levi. Hann var 55 cm langur og vigaði 4.140 gr.

2. september fingu Barbara og Sámal Joensen í Streymnesi eina dóttur, sum eitur Anni-Kate. Hon var 52 cm long og vigaði 3.600 gr.

5. september fingu Bjørg Hovland Hjelm og Anfinn Hjelm í Tórshavn ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3.550 gr.

3. oktober fingu Marin og Tonny Brimsvík, Havn, eina dóttur. Hon var 57cm long og vigaði 4.000 gr.

# Tiltøk

## TILTØK Á BREKKU 3

(bygningurin aftan fyri MBM)



**Undirvísing, bøn og bønarskúli** **týskvøld kl. 20.00**

| | |
|---|---|
| 2. okt. | Evni: Bønarløta |
| 9. okt. | Evni: Túrurin hjá Jógvani í Kina |
| 16. okt. | Evni: Húsbólkar (einki møti) |
| 23. okt. | Evni: Skeið fyri nýggj í Lívdini |
| 30. okt. | Evni: Skeið um dóp (fyrireiking til dóp á Zarepta) |

## Leiðari til dreingjabólk

Søkt verður eftir einum ungum manni ella drongi at taka sær av bólkinum fyri dreingir, sum ganga í 8., 9. og 10 flokki.

Um onkur er áhugaður, so kann viðkomandi venda sær til Ninu á tlf. 26 77 33

## Ungdómsmøtini í skúlanum

Ungdómsmøtini eru í Skúlanum í Hoyvík hvørt fríggjakvøld kl. 21.00.

Annaðhvørt fríggjakvøld talar Dánjal Petersen um evnið „Tá genta og drongur møtast". Tosað verður m.a. um, hvør er tann rætti ella rætta, um tað er skeivt at ganga saman við einum vantrúgvandi, og um tað er skeivt at fara í song saman áðrenn giftarmál.



*Dánjal Petersen*

Lýst verður frammanundan, hvat er á skránni.

## Christmas Child



Aftur í ár verður Lívdin við í Christmas Child tiltakinum, sum er heimsins størsta jólatiltak fyri børn. Nógvir sunnudagsskúlar í landinum taka í hesum sambandi ímóti skógvaeskjum við gávum í. Sunnudagsskúlin í Lívdini tekur ímóti eskjum til og við 28. oktober 2007.




## Lívdin til Zarepta

Vikuskiftið 2. til 4. november verður samkomulega hjá Lívdini á Zarepta. Har verður eisini dópur. Undan leguni verður skipað fyri skeiði um dóp. Til ber at tekna seg á heimasíðuni www.livdin.fo undir innanhýsis.

# Skráin fyri møtini í Hoyvíkar skúla





### Sunnudagin 7. oktober

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | *Evni: Hjartamál: Samrøða við fólk í Lívdini: Poul Guttesen* |
| Tilbiðjan og læra kl. 12.00: | *Evni: Fagnaðarsongur Lambsins* <br> *Talari: Poul Guttesen* |

### Sunnudagin 14. oktober

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | *Evni: Hjartamál: Samrøða við fólk í Lívdini* <br> *(Signing av børnum)* |
| Tilbiðjan og læra kl. 12.00: | *Evni: Rómbrævið 1-8* <br> *Talari: Jógvan Zachariassen* |

### Sunnudagin 21. oktober

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | *Evni: Lovsongsdagur* <br> *(Signing av børnum)* |
| Tilbiðjan og læra kl. 12.00 | *Evni: Frá steinhjarta til kjøthjarta (1)* <br> *Talari: Jógvan Zachariassen* |

### Sunnudagin 28. oktober

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | *Evni: Christmas Child* <br> *Skógvaeskjurnar og familjurnar* |
| Tilbiðjan og læra kl. 12.00 | *Evni: Frá steinhjarta til kjøthjarta (2)* <br> *Talari: Jógvan Zachariassen* |

** Fyrivarni verður tikið fyri broytingum í skránni.*

*Útgevari: Samkoman Lívdin – www.livdin.fo · Ábyrgd: Magnus Gunnarsson · Teldupostur: faldarin@livdin.fo*